## Samanhald í Mikladali

Síðan 2004 hava KÍ-smápiltar, sum eru føddir í 1997 og 1998 verið á sama liði. Samanhaldið hevur verið óført og úrslitini ikki minni. Fríggjadagin fóru 2 foreldur og venjararnir Olgar Danielsen og Manni Waag Høgnesen, sum báðir eiga synir á liðnum, til Mikladals. Ferðalagið helt til í Avhaldshúsinum, har undirhald var á skránni. Sjálvandi var eisini farið á FIFA Sparkivøllin í Mikladali at spæla. Leygardagin var so farið aftur til Klaksvíkar við Stranfaraskipinum Sam. Dreingirnir skulu nú hvør sína leið, tí teir sum eru føddir í 1997 fara í piltadeildina og teir sum eru føddir í 1998 framhaldandi skulu spæla í smápiltadeildini, so túrurin var ein seinasta ferð, áðrenn liðið fer í tvíningar. Enn eitt gylt prógv um, hvønn sosialan týdning fótbóltur, og ítróttur sum heild hevur, á bæði íðkarar og avvarðandi av íðkarum. Drívið á dreingir



# FM í Trongisvági

**FM fyri einstaklingar varð um vikuskiftið hildið í Trongisvági, og eftir fyrsta kvøldið, var tað TBF, ið var nærum einaráðandi**

FÓTBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Eftir fyrsta kvøldið, var greitt, at TBF er nærum einaráðandi, tá tað kemur til yngru deildirnar. Eisini Royn eru byrjaðir at vísa tenn, eftir bert at hava vant í sløk tvey ár, og væl spurdist eisini burturúr, má man siga, eftir so stutta tíð. Royn vann heili tvey triðja pláss í einmansleiki.

Tá tað so er sagt, so kemst ikki uttanum, væla úrslitini, TBF hevur havt, seinastu mongu árini. TBF hevur havt eitt rimmar ungdómsarbeiði seinastu mongu árini, og nærum hvør einasti ungdómur dugur at halda einum batti.

Serliga væl fyri liggur hjá TBF gentunum. Tær hava aftur í ár verið at kalla einaráðandi, og er tað bert at frøast yvir.















**Smápinkur: Einmansleikur**
1. Durita F. Jensen TBF
2. Sofía Maria Ferjá TBF
3. Rebekka Petersen TBF

**Tvímansleikur:**
1. Durita F. Jensen/Sofía Maria Ferjá TBF
2. Lóa Farstad/Julia Mortensen TBF

**Smápiltar: Einmansleikur:**
1. Hávar Albinus TBF
2. Dávid Mortensen TBF
3. Jóan Eli Thomsen Royn

**Tvímansleikur:**
1. Dávid Mortensen/Hávar Albinus TBF
2. Rebekka Petersen/Jóan Eli Thomsen TBF og Royn

**Pinkur: Einmansleikur:**
1. Lív Øster TBF
2. Durita F. Jensen TBF
3. Vár Holm TBF

**Tvímansleikur:**
1. Anna Mikkjalsdóttir/Lív Øster TBF
2. Vár Holm/Sára Olsen TBF
3. Durita F. Jensen/Sofía Maria Ferjá TBF

**Piltar: Einmansleikur:**
1. Eyðfinnur Jensen TBF
2. Knútur Jóannesarson Tór
3. Bjørgvin Sveinbjørnsson Royn

**Tvímansleikur:**
1. Knútur Jóannesarson/Sveinur Nólsøe Tór
2. Eyðfinn Jensen TBF/ Bjørgvin Sveinbjørnsson Royn
3. Árnfríður Olsen Royn/ Hávar Albinus TBF